

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 25
September 2015

ISSN 1603-0036

Provisoriumerkini 1940-41
Jólavørur 2015
Árbók, ársmappa og jólamerki

Posta
FAROE ISLANDS



# Provisoriumerkini frá 1940-41 - 75 ár síðani

Í Føroyum endurtók søgan seg í stóran mun, um vit samanbera seinna heimsbardaga við fyrra: Avbyrging í mun til restina av ríkinum, har einasta sambandið út í heim var við Bretland og lutvíst Ísland. Skjótt var vørutrot gerandisdagur og longu í 1939 vórðu t.d. skamtanarmerki tikin í nýtslu. Provisoriskir pengaseðlar vórðu eisini tiknir í nýtslu.

Tað var eisini lagnunnar speisemi, at óttin og vandin fyri frímerkjatroti kom í á posthúsinum í Havn í 1940 eins og í 1919, har Johan Danielsen, postmeistari, eisini mintist støðuna í 1919.

Danielsen vist fullvæl, at goymslan av frímerkjum við átrokandi virðum neyvan var nøktandi, meðan tað helst var ovmikið av øðrum virðum.

Fortreytirnar at fáa fleiri frímerki til Føroya vóru tó ikki av teimum bestu, skuldi tað vísa seg, hóast kríggið brast á í september 1939 og Danmark ikki varð hertikið fyrr enn 9. apríl 1940.

Postsambandið var hampiliga regluligt ta fyrstu tíðina, men á heysti 1939 kravdu bretsku myndugleikarnir, at skipafeløgini m.a. DFDS og Bergenska, sum sigldu millum Danmark og Føroya við posti, skuldu inn í Kirkwall til eftirlit, t.v.s. sensur. Avleiðingin var, at hesi feløg longu í februar 1940 boðaðu frá, at tey ikki tóku post við á hesari rutu.

M.a. av hesum orsøkum og truplum siglingarlíkindum, so sum nógvum ísi í Skagerrak og Kattegat, heldur enn av krígsávum, fekk posthúsið í Havn ikki tey neyðugu frímerkini, áðrenn Danmark varð hersett 9. apríl 1940. Samstundis settu bretar teir fyrstu 250 hermenninar á land í Føroyum tann 13. apríl 1940. "Islandsk Falk", sum kom á Havnina tann 23. februar 1940,






Posthúsið í Tórshavn
Johan Danielsen, postmeistari
"FRANCO BETALT" stempul

skuldi vísa seg at verða seinasta vanliga postsambandið millum Danmark og Føroyar til kríggið var av.

Tað bøtti ikki um støðuna hjá Danielsen postmeistara, at amtmaðurin, Hilbert, helst fyri at staðfesta sína støðu sum "The Governor" í Føroyum, gav boð um, at tey nýggju postgjøldini í Danmark skuldu setast í gildi í Føroyum 10. juli 1940. Hetta, hóast eingin visti nær ella um Føroyar fingu nøkur frímerki svarandi til nýggju postgjøldini, har t.d. eitt vanligt bræv fór úr 15 oyru upp í 20 oyru!

Longu tann 27. apríl 1940 skrivaði Danielsen, postmeistari til skrivstovuna hjá Heimspostfelagnum í Bern (UPU), at fáa tey at skipa soleiðis fyri at donsk frímerki kundu verða send umvegis uttanveltað lond til Føroya, men eingin visti, hvussu hetta fór at eydnast.

Ein av fyrstu loysnunum, sum Danielsen arbeiddi við, var at gera sonevnd "FRANCO BETALT" hondstempul áljóðandi 5 øre, 10 øre og 20 øre. Fýra sett vórðu gjørd at nýta í Havn, Klaksvík, Tvøroyri og Vági.

Men Danielsen hálsaði um. Honum dámdi als ikki hesa ótraditionellu loysn. Heldur valdi hann ta kendu loysnina frá 1919, at posthúsini um neyðugt skuldu klára seg við yvirstemplaðum frímerkjum sum longst. Franko hondstempul vórðu tískil løgd í skuffuna í fyrsta umfari.

**Yvirstemplað frímerki tikin í nýtslu**

Prentsmiðjan hjá H.N.J. Bókahandli fekk ein virknan leiklut, tá avgerð varð tikin um




Ovast: yvirstempladu frímerkini 1940-41
Niðriundir: postgjaldsmerkini, sum komu út 01.10.2015

at yvirprenta tey fyrstu frímerkini á heysti 1940. Tað var yvirkontrollørurin Laurits D. Hansen, ið var virkandi postmeistari, sum stóð fyri hesum arbeiði, tí Danielsen var sjúkrameldaður um hetta mundið.

Tvey ørk, reytt 15 oyru "Karavel" vórðu nýtt sum royndarørk, har eitt 20 tal varð prentað yvir 15 talið. Hesi royndarprent miseydnaðust, tí mett var at yvirprentið sást ov illa. Tískil varð ein bjálki settur undir 20 talið, tá tey 1399 ørkini vórðu prentað. Hesi vórðu seld fyrstu ferð tann 2. november 1940.

Hóast nakrar pakkasendingar við frímerkjum úr Danmark náddu heim til Føroya umvegis uttanveltað lond eftir hesa fyrstu yvirprentingina, so gjørdist listin við

Tey yvirstempladu frímerkini í 1940-41 vóru hesi:

| Virði | Litur | Nr. | Dagfesting | Eintøk /ørk |
|---:|---|---|:---:|---:|
| 20/15 oyru | reytt | AFA203a | 02.11.1940 | 139.900 |
| 50/5 oyru | vínreytt | AFA246 | 06.12.1940 | 25.000 |
| 60/6 oyru | orangegult | 254 | 21.12.1940 | 17.500 |
| 20/1 oyru | grøntsvart | 196a | 02.05.1941 | 42.500 |
| 20/5 oyru | vínreytt | 246 | 17.03.1941 | 70.000 |

Á sumri 1941 var 2. upplag yvirstempladð:

| Virði | Litur | Nr. | Dagfesting | Eintøk /ørk |
|---:|---|---|:---:|---:|
| 20/1 oyru | grøntsvart | 196 | 03.06.1941 | 4.000 |
| 60/6 oyru | orangegult | 254 | 11.06.1941 | 5.000 |
| 50/5 oyru | vínreytt | 246 | 23.06.1941 | 2.500 |

yvirstempladum frímerkjum í Føroyum undir seinna heimsbardaga longri, tí ymisk frímerkjavirði gingu undan sum fráleið.

Tað er munur á fyrra prentinum og seinna, har frástøðan millum nullini í yvirstemplinum er 13 mm. Tá prentsmiðjan hjá HNJ var ein bókaprentsmiðja, so eru eisini nógv frábrigdi (variantar) í øllum hesum ørkum.

**"FRANCO BETALT" tikin í nýtslu**

Árið 1941 var ikki gamalt, tá tað var Danielsen og Hilberti greitt, at støðan var alt annað enn nøktandi. Hóast nýggju yvirstemplingarnar, so máttu onnur tiltøk til. Tað kom enntá uppá tal at nýta ensk frímerki í Føroyum; men heldur enn hesa loysn, so samdust Danielsen og Hilbert at taka áður umtalaðu "FRANCO BETALT" hondstemplini í nýtslu. Seinni varð so tað eina hondstemplið "5 øre" borað út, t.v.s. 5 talið tikið burtur, so postavgreiðslufólkini bara kundu skrivað upphæddina fyri postsendingina ístaðin.

Eftir krígslok skrivaði Danielsen í einari frágreiðing um hesa støðu, tá hesi stempul kortini vórðu tikin í brúk: "Dette skete i den yderste Nød".

**6 oyru frímerki seld fyri 5 oyru**

Fyrst í juni mánaða 1941 kom ein sending við frímerkjum úr Danmark. Hon kom væl við, men lægsta áljóðandi frímerkjavirði var 8 oyru. Um hetta mundið var goymslan av 5 oyra merkjum um at ganga undan. Tískil hendi nakað á postskrivstovuni í Havn, sum vit av røttum kunnu nevna eina "heimssensatión", tí Danielsen, postmeistari skipaði fyri, at í tíðarskeiðinum 26. mai 1941 til 8. september 1941 vórðu 180 ørk av 6 oyra frímerkjum seld fyri 5 oyru!

Umframt hetta var ein frankeringsmaskina bíløgd úr Bretlandi, sum tó ikki kom fram fyrr enn í 1943. Í stuttum kann tó sigast, at hon var lítið brúkt.

Tað gekk nú betur at fáa frímerkjasendingarnar fram. Og eftir 1943 var ikki brúk fyri nøkrum serstøkum átøkum til tess at nøkta frímerkjatørvin í Føroyum.

Sum eitt ískoyti til hesa søgu skal nevnast, at kendi danski frímerkjasavnarin Aage Tholl, sum hevði ein serligan alsk til føroyska postsøgu, sendi 5. apríl 1952 ein fyrispurning til postmyndugleikarnar í Danmark um hesi yvirstempladu frímerkini frá 1940-41. Tholl vildi vita, um tað enn var loyvt at frankera við hesum frímerkjum, og fekk hann eitt játtandi svar. Í einum skrivi frá 2. juli 1953 ógildaði aðalstjórnin tó hetta loyvið, tí nýtslan av yvirstempladum frímerkjum í Føroyum var í veruleikanum ein bráðfeingisskipan undir seinna heimsbardaga.

Men tá var longu gerandisdagur aftur í Føroyum, tí seinastu skamtanarmerkini og harvið vørutrotið annars var komið í rættlag við árslok 1952.

Álvur Danielsen




# Jólavørur 2015

**Jólaundirløg**
Sum siður hevur verið seinastu árini, so gevur Posta út eitthvørt jólaprýði. Í ár hava vit valt at ganga nýggjar leiðir hesum viðvíkjandi.

Vøkru tekningarnar hjá Edward Fuglø av jólaevangeliinum, sum hava prýtt jólafrímerkini seinastu trý árini, kunnu nú eisini prýða jólaborðið. Eitt sett við seks smáum glasundirløgum umframt seks stór undirløg eru framleidd og klár at senda tær.

Settini við 6 undirløgum (10 x 10 cm) kosta 60 kr. settið,

Stóru undirløgini (18 x 18 cm), kosta
35 kr. hvørt.

**Jólakúlur**
Somu tekningar prýða eisini vøkru jólakúlurnar, sum kunnu heingjast á jólatræið.

Jólakúlur, 6 stk.: 149 kr. settið

**Jólamerki**
Edward Fuglø hevur teknað ársins jólamerkjaark, sum ímyndar eitt grafiskt jólatræ prýtt við kertuljósum. Sermerktu glæmurnar frá kertuljósunum eru allar ymiskar.

Avlopið av søluni fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr.




**Jólakort**

Trý vøkur jólakort við myndevnum úr jólamerkjaarkinum fáast eisini til keyps. Jólakortini eru dupult og verða seld sum sett saman við bjálvum.

Jólakortini kosta 25,00 kr. settið.

**Ársmappa**

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst? So er hetta loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

Ársmappan kostar 373,00 kr.

**Árbók**

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftanfyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum.

Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og enskum og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands.

Frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini.

Árbókin kostar 398,00 kr.

# Nýggjar vørur - november 2015




Nýggj útgáva: **Árbók 2015**
Útgávudagur: 09.11.2015
Virði: 398,00 kr.
Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark




Nýggj útgáva: **Ársmappa 2015**
Útgávudagur: 09.11.2015
Virði: 373,00 kr.
Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark



Nýggj útgáva: **Jólamerki 2015**
Útgávudagur: 09.11.2015
Virði: 30,00 kr.
Sniðgevi: Edward Fuglø
Prentsmiðja: Cartor Security Printing, Frakland


Framsíðumynd: Jólatræið á Vaglinum. Mynd: Ólavur Frederiksen.
Snið og uppsetan: Posta Stamps. Prentsmiðja: Føroyaprent.



Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo


/faroestamps